


*U19-landsliðið, sum mánadagin spældi ímóti Ashington, spælir í dag ímóti einari blanding av eykaliðnum og ungdómsliðnum hjá Newcastle FC. Millum mótstøðuleikararnar verður Jóan Símun Edmundsson, sum hevur verið í enska felagnum síðani í februar*

*Mynd: FSF*

# Ungdómslandslið í Newcastle

**U-LANDSLIÐ** Trý av ungdómslandsliðunum eru í hesum døgum á venjingarlegu í Newcastle, og í dag skal U19-liðið spæla ímóti Jóan Símuni Edmundsson og teimum í Newcastle FC

## Hagtøl úr Newcastle:

### Newcastle - Føroyar U15 0-1 (0-0)

0-1: Brandur Olsen

**Byrjunarliðið (4-2-3-1):** Axel Berg (B36) – Betuel Hansen (NSÍ), Leivur Højgaard (NSÍ), Jákup F. Hansen (HB), Hilmar L. Jacobsen – Hákun Edmundsson (B68), Áron Clementsen (B71) – Sigurd Poulsen (B36), Brandur Olsen (B71), Patrik Jóhannesen (TB/Royn) – Poul Ingason (TB/Royn)
***Á bonkinum:*** Jóhannus Hansen (B68), Súni Højgaard (HB), Rói Olsen (EB/Stremur), Esmar Clementsen (B68), Tór av Skarði (HB), Elias Rasmussen (Víkingur), Jákup Olsen (Víkingur), Bartal Wardum (HB), Meinhard Olsen (NSÍ)

### Newcastle - Føroyar U17 1-1 (0-0)

1-0: Magnus Egilson

**Byrjunarlið (4-4-2):** Petur Høj (NSÍ) - Bárður Guttesen (HB), Hørður Askham (B36), Allan Hansen (EB/Streymur), Rói av Fløtum (HB) – Jóhan á Plógv (HB), Brandur Suðuroy (VB), Kári Hvannastein (HB), Ári Danielsen (HB) – Magnus Egilson (OB), Ragnar Tausen (TB/Royn)
***Á bonkinum:*** Jákup Sveinbjørn Olsen (MB/SÌ/SÍF), Arnold Kristiansen (ÍF), Andrias H. Eriksen (Varde IF), Rasmus Dan Sørensen (B36), Eirikur M. Ellendersen (TB/Royn), Marcus Clementsen (B71), Teitur Olsen (TB/Royn), Eli Leifson Nolsøe (Oure)

### Ashington - Føroyar U19 3-1 (2-0)

1-2: Holger Durhuus

**Byrjunarlið (4-2-3-1):** Teitur Gestsson (OB) – Andras Vágshegg (FC Fyn), Eli F. Nielsen (07Vestur), Sørmund Kallsø (KÍ), Rógvi Nielsen (07Vestur) – Ari Ellingsgaard (ÍF), Bogi R. Petersen (Vejle) – Rene Joensen (Brøndby), Gunnar Zachariassen (Brøndby), Ivan Joensen (KÍ) – Páll H. Jacobsen (HB)
***Á bonkinum:*** Pál Joensen (HB), Justinus Johan Jacobsen (KÍ), Holgar Durhuus (07Vestur), Kristian Joensen (NSÍ), Árni Frederiksberg (NSÍ), Janus M. Thorup (Kastrup)

Tróndur Arge

Tey trý ungdómslandsliðini – U15, U17 og U19 – fóru úr Vágum beinleiðis til Newcastle sunnudagin, og mestsum beinanvegin fóru tey til venjing á sama stað, sum ungdómsdeildin hjá Newcastle FC venur. Seinni hugdu allir so eftir HM-finaluni heima á gistingarhúsinum.

Mánadagin vóru øll liðini í eldinum ímóti lokari mótstøðu, men í gjár høvdu tey frí, tá eitt nú høvi var at fáa eina rundferð á St. James' Park, sum er leikvøllurin hjá Newcastle FC. Í dag skulu so øll trý liðini spæla ímóti ungdómsliðum hjá Newcastle FC.

Serliga spennandi verður tað, tá U19-landsliðið skal spæla ímóti einari blanding av eykaliðnum og ungdómsliðnum hjá Newcastle, tí millum mótstøðuleikararnar verður føroyski Jóan Símun Edmundsson, sum síðani februar í ár hevur spælt við Newcastle.

Bæði U15- og U17-landsliðini skulu víðari til Aberdeen International Football Festival, eftir at tey hava verið í Newcastle, meðan U19-landsliðið kemur heimaftur, tá vikan í Newcastle er av. Venjingarlegan í Newcastle er samstarv millum Fótbóltssamband Føroya og North Atlantic Football Agency hjá Jákupi í Stórustovu.

## Sigur og javnleik

U15-landsliðið vann sum einasta føroyska liðið sín venjingardyst mánadagin í Newcastle. Liðið spældi ímóti einum úrvaldsliði úr Newcastle-økinum. Dysturin var spældur í einari høll á venjingarmiðstøðini hjá Newcastle FC.

Hóast tað var stutt upp til loftið og graslíki á vøllinum, so eydnaðist dysturin væl og umstøðurnar vóru fínar til ein U15-dyst. Einsamalla málið hjá føroyingum skoraði Brandur Olsen úr B71, sum spældi á framrættaða miðvøllinum.

Mótstøðan hjá U17-landsliðnum var somuleiðis eitt úrvaldslið úr Newcastle-økinum. Føroyingarnir vóru væl við allan dystin, og 10 minuttir inn í seinna hálvleik legði Magnus Egilson Føroyar á odda við beinleiðis frísparki. Men stutt eftir javnaði úrvaldsliðið til endaliga úrslitið, 1-1.

## Sterk mótstøða

Teir elstu fingu sína sak fyri, tá teir fóru á vøllin ímóti Ashington, sum millum annað hevði tveir fyrrverandi eykaliðsleikarar hjá Newcastle á liðnum. Teir vóru eldri, størri og væl sterkari enn leikararnir á U19-landsliðnum. Tað gekk eisini hart fyri seg í fyrra hálvleiki og fleiri ferðir vóru taklingarnar í góða, gamla enska stílinum.

Ashington kom á odda við tveimum málum í fyrra hálvleiki og føroyska liðið hevði trupulleikar av sterku kropsligu styrkini hjá mótstøðuni. Sum tíðin gekk, góvu føroysku leikararnir aftur av somu skuffu og komu væl við í dystin, og í seinna hálvleiki lá í luftini, at føroyska liðið fór at fáa mál.

Tá eitt lítið korter restaði, minkaði innskifti Holger Durhuus um munin við góðum máli. Hann varð spældur leysur í brotssteiginum og smekkaði bóltin í handari stong og inn. Eftir hetta royndu føroyingarnir at trýsta fyri at fáa útjavnandi málið, men í staðin økti Ashington við seinasta sparkinum í dystinum.

trondur@sosialurin.fo